# Nøvn

## Føðingar

15. juni fingu Jonna og Jens Olivur Erlingsson, Hvalba, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3900 gr.

24. juni fingu Andrea á Hvítanesi og Claus Martin í Grund, Toftum, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3455 gr.

30. juni fingu Helge Eysturberg og Laila Jespersen, Trongisvági, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3860 gr.

30. juni fingu Palma Djurhuus og Birgir av Steinum, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3950 gr.

3. juli fingu Mona Wang og Magni Brøðraberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3320 gr.

3. juli fingu Heidi Hammer og Santiago Anda, Sandavági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4250 gr.

4. juli fingu Edith Næs og Poul Hallur Davidsen, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3600 gr.

## Jógvan farin um tey áttati

Hjá okkum sum búgva í umhvørvinum, har Jógvan I. Olsen er virkin, kennist tað eitt sindur undarligt, at hesin sáttligi, skilagóði og gløggi maður í gjár fór um tey áttati. Hetta er ikki eingin aldur, men sigast má, at Jógvan ber sín aldur sera væl.

Jógvan I. Olsen taldist í mong ár millum tungu dreingirnar í føroyskum politikki, og ikki minst í kjaki og viðgerð av fiskivinnu og vinnulívi vigaðu hansara orð tungt.

Hann hevði stóra virðing millum manna – ikki bara innanfloks, men eisini í øðrum flokkum og millum fólk, sum annars ikki vóru samd við honum um tilknýti í ríkisfelagsskapinum.

Abbi mín, Oluf Jacobsen, var íðin loysingarmaður, men hann hevði mangan á orði, hvussu skilagóður Jógvan I. Olsen var í fiskivinnuspurningum, og hann hevði ógvuliga stóra virðing fyri hesum manni.



Undan tíðini, Jógvan I. Olsen sat á løgtingi fyri Sambandsflokkin, í landsstýri og sat sum løgtingsformaður, var hann í nógv á til skips og var skipari.

Hann hevur eisini verið reiðari og vinnulívsmaður.

Jógvan I. Olsen kom á ting í 1970 og sat fram til 1998, tá hann ikki stillaði uppaftur.

Umframt at vera við í landspolitkki øll hesi ár, hevur hann eisini sitið í bygdaráðnum í Nes kommunu og var eitt skifti borgarstjóri.

Jógvan I. Olsen hevur fingist nógv við seyð, fyrifallandi útróður, og hann hevur stóran áhuga og eina velduga vitan um tey fornminni, sum eru í kommununi.

Vit í Miðlahúsinum ynskja Jógvani I. Olsen tillukku við degnum.

*vilmund@sosialurin.fo*

## Símun Pauli Djurhuus 90 ár



Mánadagin 12. juli verður Símun P. Djurhuus, fyrrverandi málarameistari í Havn, 90 ár.

Símun er ættaður úr Porkeri. Sum heilt ungur fór hann í málaralæru hjá Andreas K. Mouritsen.

Símun giftist við Rebekku, sum var ættað av Skála. Tey fingu fýra børn.

Fyrst í sekstiárunum flutti familjan til Havnar, har Símun arbeiddi hjá Málingahandlinum í nøkur ár. Síðan arbeiddi hann sjálvstøðugt sum málarameistari. Kona Símun, Rebekka, doyði í 2001. Símun eigur fýra abbabørn og tvey langabbabørn.

Tey, sum ynskja at heilsa upp á Símun føðingardagin, eru vælkomin á Suðuroyarveg 7 frá kl. 17.

## Merkisdagar

### 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 11. juli verður Jenny Ellingsgaard, Eiði, fødd Rasmussen og ættað av Norðskála 90 ár. Tann, ið hevur hug at heilsa uppá Jenny á føðingardegi hennara, hendan dagin, er hjartaliga vælkomin á Korndalsbýlið á Eiði millum kl 15.00 og 18.00.

### 90 ára føðingardagur

Týsdagin 13. juli verður Johannes M. Olsen, vanliga nevndur Hanni, ættaður av Toftum, búsitandi í Havn, 90 ár. Dagurin verður hildin á Lágargarði frá kl. 16 – 19.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagin 12. juli verður Símun Pauli Djurhuus, málari, Tórshavn 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Símun eru hjartaliga vælkomin á Suðuroyaveg 7, frá kl. 17.00

### 90 ára føðingardagur

Mikudagin 14. juli verður Hans Marius (Lilleven) Johansen, Tvøroyri 90 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Lilleven henda dagin eru hjartaliga vælkomin á Hotel Tvøroyri ímillum kl 11.00 og 15.00.

### 85 ára føðingardagur

Leygardagin 17. juli verður Leif Djurhuus Vágur 85 ár. Tey, ið vilja heilsa upp á Leif henda dagin, eru hjartaliga vælkomin á Eldrasambýlið í Vági millum kl. 14 og 17.

### 85 ára føðingardagur

Fríggjadagin 9. juli fyllir Karin Johannesen, Tórshavn, 85 ár. Dagurin verður hildin á Ellisheiminum frá kl.16 til 21.

### 80 ára føðingardagur

Fríggjadagin 9. juli verður Sanna Johannesen, Skála 80 ár. Vælkomst verður í Meinigheithúsinum á Skála frá kl. 18. fríggjadagin.

### 75 ára føðingardagur

Mánadagin 19. juli fyllir Daniella Olsen, Hósvík, 75 ár. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum sunnudagin 18. juli frá kl 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 65 ára føðingardagur

Hósdagin 15 juli verður Páll Petersen, Kaldbak 65 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 17. juli frá kl 11 til 16. í Pálsstovu til brunch. Gott at sæð familiu, vinir og kenningar hendan dagin.

### 60 ára føðingardagur

Mikudagin 4. august verður Heiðveig Tindskarð, Tórshavn, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 1. juli á tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

### 30 ára føðingardagur

27. juli fyllir Theodor Esmar Hansen 30 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 24. juli kl. 18 í Bowling í Leirvík. Tey, ið vilja gleða Theodor Esmar við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 15. juli á tlf. 421309 ella 721309

### Prógv

Bertha Tróndardóttur Nybo hevur 25. juni lokið prógv sum professions bachelor (námsfrøðingur) á Professionshøjskolen University College Nordjylland í Hjørring.

### Prógv

Jóhanna Petursdóttir av Strondum hevur á Metropol í Keypmannahavn lokið prógv sum bioanalytakari.